

# Greinarar halda at oljuprísurin kann lækka til 50 dollarar í 2020

**Jógvan Hugo Gardar**

02.08.2015 - 22:40

Oljan.fo

Stóra greiningarfyritøkan Goldman Sachs er komin við eini nýggjari meting av gongdini hjá oljuprísinum komandi árini.

Fyri tey sum skulu brúka oljuna er hetta hugalig tíðindir, men fyri oljuvinnuna er hetta sera neiligt. Longu í dag, tá prísurin er frá nøkrum og 50 dollarum fyri fatið og einstakar dagar uppum 60 dollarar, so síggja vit at allur oljuídnaðurin er meint raktur, og sparingar og uppsøgnir eru gerandistíðindir. CNBC.com skrivar frá frágreiðingini hjá Goldman Sachs, sum sigur at oljuprísurin kann vera um 50 dollarar fatið í 2020, og tað merkir enn tyngri rakstur hjá oljufeløgunum.

Bara farnu vikuna hava Shell, Centrica og Chevron boða frá at tey noyðast at koyra túsundtals folk heim, í eini roynd at spara so fyritøkurnar kunnu klara seg ígjøgnum kreppuna sum rakar í løtuni. Shell skal siga 6500 fólk úr starvi, Centrica koyrir 6000 heim og Chevron skal kappa tvey prosent av starvsfólkatalinum.

Hasar sparingarnar koma samstundis sum norðsjóvaroljan Brent verður seld fyri 53 dollarar fyri fatið, og amerikanska lættoljan WTI fyri 47 dollarar fatið.

Goldman Sachs sigur í síni frágreiðing at oljufeløgini gerast betri til at útvinna oljuna, og hava ikki brúk fyri so nógvum fólkum. Hetta kemur at gera at brúk er fyri færri fólkum í oljuídnaðinum, samstundis sum meir olja kemur á marknaðin. Hetta gevur samanlagt tað niðurstøðuna at um knøpp fimm ár so vil oljuprísurin lækka til umleið 50 dollarar fyri fatið.

Heimsbankin heldur hinvegin at prísurin á WTI-oljuni kemur at liggja um 57,50 fyri fatið í ár, og 71,90 dollarar í 2020. Brent-oljan liggur vanliga nakrar dollarar omanfyri WTI, so tað merkir at Norðsjóvaroljan kemur at liggja omanfyri 60 dollarar í meðal í ár, og umleið 75 dollarar í 2020.